

**Fakta um Kring Sahara við Michael Palin:**

- Í miðal sóu 8,25 milliónir BBC hyggjarar tær fýra sendingarnar, hetta er meiri enn "Kring jørðina" røðina.
- Myndirnar vóru tiknar millum februar 2001 og februar 2002.
- Bókin "Michael Palin — Sahara" varð liðug í mei 2002, og kann annars lesast á www.palinstravels.co.uk.

**Kring Sahara við Michael Palin á Dr1, mánadag 3. kl. 19.00**



### Nýggj ferðarøð við Michael Palin á Dr1:

# Kring Sahara við Michael Palin

**Hugurin hjá Michael Palin at ferðast og práta við ókend fólk er ikki vorðin minnið við árunum. Seinasta ævintýrið, at ferðast gjøgnum Sahara, er ein av teimum heilt stóru avbjóðingunum fyri einhvønn ferðandi.**

"Eg eri einki serliga dugnaligur til at ferðast. Eg dugi ikki nógv mál og eri sera heftur at øðrum fólkum. Tað hevði ikki verið nógv um meg, um eg var einsamallur." Soleiðis segði Michael Palin við sjónvarpsblaðið hjá BBC, Radio Times, áðrenn røðin "Kring Sahara við Michael Palin" hevði frumsýning á BBC.

Tað er nokk tí hyggjarar elska hann. Tað er ein partur av sjarmu hansara, at alt ikki bara gongur eftir ánni, t.d., at síggja Palin fanglast við fremmandar myntir, tá hann skal keypa dadlir ella, tá hann roynir at smílast sum frægast fyri einum sera gronutum pasløgreglumanni mitt úti í oyðimørkini. Hetta fær kanska hyggjaran at halda, at hetta væl ber til at kasta seg útí.

**Við lívinum í vanda**
Tað er als ikki ein minnið avbjóðing sum Michael Palin og liðið frá BBC hava sett sær fyri hesuferð. Londini í og rundanum Sahara kunnu vera serliga trupul at fáa visum til, ofta seta myndugleikarnir forðingar í vegin fyri at ein kann flyta seg. Tann størsta avbjóðingin liggur í vánaligu vegunum og at teir fyri tað mesta yvirhøvur ikki eru har. Eingin motorvegur gongur gjøgnum Sahara, og gerst ein vilstur ella ikki hevur meiri brennievni er tað ringasta føri við lívinum í vanda. Tó er oyðimørkin sjálvdan heilt oyðin. Stillin verður brotin av kamelkaravanum og bilum, sum koma gjøgnum oyðimarkina. Her eru smuglarar og flóttafólkalegur frá ókendum kríggjum. Her eru býir og bygdir, ið eru merkt av ymiskum mentanum í londum, ið ein her norðanfyri veit sera lítið um.

**Gomul fólkasamfeløg**
Ævintýrsferðin hjá Michael Palin byrjar við Miðalhavsstrondina og fer frá Marokku gjøgnum Mauretania, Senegal, Mali, Niger, Algeria og Libia til Tunesia. Ferðaleiðin boðar frá undirhaldi í stórum nøgdum, tí um ein hyggur nærri at Sahara, er tað tó ikki tómleikin sum ræður yvir stóru sandbankunum, ið skarar framúr, men mongdin av ymiskum mentanum og landsløgum, og ein long søga hjá fólksamfeløgum, handli, kríggi og royndir at gera innrásir, heilt frá gomlu egyptunum til teir nútíðarinnar oljuríku islamisku statarnar. Søguligu sporini eru týðuligari her enn nakra aðrastaðni, orsakað av tí heita og turra veðurlagnum. Michael vitjar stórar leivdir frá Faraotíðini, borgir, bygdar av karthagánum, rómversk amfiteatur og í býnum Djenna, í Mali vitjar hann tí vøkru moskuna, sum er bygd úr runu.

**Fordómaleysur og forvitin**
Tað eru eingir lættir vegir at koma ígjøgnum Sahara eftir landi. Micael Palin møtir júst teimum somu trupulleikunum, sum ferðandi hava drigist við gjøgnum øldir. Fyri at lætta um ferðina, roynir hann at læra av teimum innføddu, ið liva undir hesum hørðu umstøðunum. Júst sum aðrar ferðarøðir hjá Palin, so kemur tað mesta fram frá teimum fólkunum sum hann møtir og prátar við á síni ferð. Michael Palin er nevniliga so fordómsleysur og forvitin at einoghvør lítir á hann. Hann kann, uttan at nakar leggur serliga til merkis, spyrja ein mann um, hvussu tað er at hava fýra konur.

**Heimkoman**
Og tá so tann stóri ævintýrarin eftir fleiri mánaðir kemur heim til London og konu sína gjøgnum 30 ár, Helen, so er væl gott lag? "Jú jú,", sigur Michael Palin, "tá eg komi heim liggur vanliga ein seðil á borðinum, "farin til badminton. Verði skjótt aftur." Eg haldi, tað vera sera sunt, at Helen ikki situr og bíðar, til telefonin skal ringja, men at hon livir sítt egna lív, tá eg eri burtur.










**Føturnar upp á borðið ...**

... lat stjørnurnar sveitta.

Við einum CanalDigital-haldi kanst tú síggja ítrótt allan sólarringin.
Enskur, týskur og italskur fótbóltur úr bestu deildunum og steypakappingunum, tennis, hondbóltur, amerikanskur fótbóltur, íshockey, kappríðing o.a.

Kom inn á gólvið og tosa við okkum um teir ymisku pakkamøguleikarnar.
Møguleiki er eisini fyri at tekna DR1 og DR2-hald.

Family við Canal+ **299,-** pr. mðr
Nokia móttakari* **990,-**
Skálkampur **990,-**



*Treytað av 12 mðr. Family við Canal+ haldi. Harumframt 390,- kr. fyri stovnan og fyrsta hálvárliga kortgjaldið

- tað er munur á!

Family við Canal+

AP-Radio Klaksvíksvegur • 700 Klaksvík Tel 21 64 50 • Fax 45 73 50

G.F.Elektronik Birnugøta 31 • FO-100 Tórshavn Tel 31 02 54 ella 21 02 54

Radiohandilin OPUS 620 Runavík • Tel 47 99 99

RADIOHANDILIN v/ Echardt & Pola Persson Sp/f Niels Finsensgøta 16 - Tel 318277

Radio - Service Vágur Tel 37 35 00 ella 21 35 00

P/F Sørvágs Radiohandil 380 Sørvágur - Tel 33 26 14

CANAL DIGITAL






VARPID